# Lalandia er fyrst og fremst fyri børnini – men eisini tey vaksnu


*Arkadurnar í Lalandia geva sentrinum ein suðurlendskan dám*



Arkadurnar í Lalandia kunnu samanberast við suðurlendsku arkadurnar, sum nógv kenna frá ferðum sunnanfyri. Í stóru yvirdekkaðu arkadunum í Lalandia kanst tú uppliva mangt og hvat, har eru matstovur, handlar, aktivitetir av ymsum slag og atgongd til ítróttarhallir.

Ein av aktivitetunum her er "high jump" trampolinir. Her verður tú fastspentur í nøkur long elastikk. Tá tey verða spent upp, kanst tú hoppa ótrúliga høgt í mun til eina vanliga trampolin.

Fýra slíkar trampolinir eru í arkaduni beint við skoytuhøllina.

Á torginum kunnu foreldur og børn hugna sær við øllum teimum mongu barnatiltøkunum, tað veri seg barnadisko ella Niels Plys, tann nógv elskaði skatta- og trillikunstnarin og ballónklovnurin í Lalandia. Á undirhaldstorginum hava vit Monky Tonky Show, har tær báðar apurnar, Monkey Tonkey og Maja hava tað stuttligt og skapa sær saman við Niels Plys.

Showið er ment í samstarvi við Johnny Reimar, sum hevur skrivað tekst og tónleik til showið.

### Innanduraaktivitetir

Teir gestir, sum vilja slappa av við ymsum likamsvenjingum hava eisini góðar møguleikar til tess. Har eru ítróttaraktivitetir fyri øll.

Innandura er innrættað eitt bowlingsentur við 11 banum.

Í ítróttarhøllini kanst tú spæla badminton, hondbólt og



kurvabólt. Harafturat eru fitnesssentur, masasja, solarium og borðtennis. Til ber eisini at venja bogaskjóting, innandura minigolf og tennis. Spurningurin er ikki um at náa alt, men at velja, hvat tú hevur hug til.

Venjingarumstøðurnar eru so spennandi, at tey í Lalandia við einum ávísum stoltleika kunnu siga, at nógv elitulið í fótbólti, hondbólti og badminton ofta hava brúkt Lalandia sum venjingarlegu sum upptakt til kappingar.

Um tú ikki er til høgan puls og sveitta á pannuni, men heldur vilt spæla billard, pool ella dart, so ber tað eisini til í Lalandia.

### Út at eta á Lalandia

Tá svongdin vitjar er ikki langt at fara út at eta í Lalandia. Har eru matstovur og onnur etistøð fyri allar gómar.

Tú kanst velja eitt nú klassisku steak-matstovuna Ferdinand Steakhouse við saftigum búffum. Mamas bjóðar eina serliga candle-light atmosferu, har tú kanst velja millum vanligar matrættir. Dámar tær betur italska køkin, so er ein stór buffé í Pizzeria. L. A. Diner bóðar fast food, og Cafe'in bjóðar kaldar og heitar drikkir eins og léttari rættir. Ynskja tit at eta í heimligum um hvørvi, so er útboðið stórt í Pizza Take Away ella L. A. Diner.

Flestu matstovurnar hava serlig spælirúm, so tey vaksnu í frið og náðum kunnu njóta matin.

Eftir døgurðan ber til at fara ein túr "í býin", um tey smáu ikki skulu til songar. Har er ymiskt spennandi at fara til og njóta eitt glas av onkrum góðum. Í Sportsbarrini er stórir flatskíggjar, har nógvar ítróttarsendingar verða vístar. Hevur tú hug til spæl og avbjóðingar, so er Little Vegas akkurát tað. Har finnur tú alt frá góðum gomlum borðspølum til modernað teldu-spøl við bili, motorsúkklu, alpinari skíðrenning, vatnskutara og nógv annað.

### Monkey Tonkey Land uttandura

Uttandura Monkey Tonkey Landið er frístaður barnanna, har tey spæla í øllum veðri. Har kunnu tey spæla gullgravarar, klatra á klatriveggum, har eru hoppipútur og bilar. Tað kostar einki at vitja Monkey Tonkey Land, tá tú ert í Lalandia.

### Egnan matvøruhandil og bakarí

Lalandia hevur eisini egnan matvøruhandil og bakarí, har tú hvønn morgun fært nýbakað morgunbreyð, og í frítíðarhúsunum eru jú góðir møguleikar at matgerð – eisini døgurða, um tit heldur vilja eta heima enn úti. Umframt klæðnahandlar og handlar við ymsari brúkslist og souvenirs, er eisini myntvaskarí.

Í Lysmagasinet ber til at keypa stuttlig ljós og at stoyta kertu.

## Aðrar upplivingar kring Lalandia

**Umframt alt tað, tú kanst uppliva á Lalandia, so eru so nógv annað at fara til á Lollandi og har um leiðir. Um tit eru við bili, so er nógv at vitja, um tit koyra 20-40 minuttir frá Lalandia í Rødby.**

**Nøkur dømi:**

**Millum heilt væl umtóktu ferðamálum er Knuthenborg Park & Safari, har vit kunnu uppliva vill djór í fríum umhvørvi.**

**Allir gestir í Lalandia fáa ein ókeypis ferðaseðil til ein shopingtúr við Scandlines til Puttgarden í Týskalndi, har til ber at vitja stóru Border Shopina. Ferjurnar sigla hvønn hálva tíma, og nógv nýta høvið at taka av sera góðu tilboðunum í Border Shopini, har alt kann keypast tollfrítt.**

**Miðaldarsentrið í Nykøbing Falster er eitt av nógv vitjaðu ferðamálum fyri tey, sum fegin vilja uppliva, hvussu fólk búðu í miðøld. At koma higar er sum ein tíðarferð fleiri hundrað ár aftur í tíðina. Har ber til at uppliva, hvussu gerandisdagurin var tá – og at uppliva drápiligu riddarakappingarnar við hestum, svøri og øks. Sentrið er opið frá síðst í apríl til síðst í september – og opið í vetrarferiuni.**

**Russiski kavbáturin í Nakskov, ein toktúrur við Museumsbananum millum Maribo og Bandholm, og Automobilsavnið við Aalholm Slot eru eisini góð boð upp á útferð fyri forvitnu familjuna.**



**BonBon-Land í Holme Olstrup við Næstved bjóðar heildagsupplivingar, har børnini kunnu hvína í rutchebanum, hoppa á pútum og royna fleiri 60 ymiskar upplivingar.**

**150 km eru til Keypmannahavnar, sum sjálvandi eisini er ein møguleiki.**